# Almannamálaráðið

Dagfesting: 21. januar 2020
Mál nr.: 19/00944-3
Málsviðgjørt: Heri Petersen

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 142 frá 13. desember 2019, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 20. ...**<br>*Stk. 3.* Afturat inntøkuni sambært stk. 1 skal leggjast útgjald av tvungnari uppsparing eftir reglunum í eftirlønarlógini, tó undantikið kapitalútgjald. | **1.** Í § 20, stk. 3 verður "tvungnari" strikað. |
| **§ 27.** Rætturin til veitingar sambært hesi lóg heldur uppat við endan av tí mánaði, sum kemur aftaná mánaðin ein pensionistur doyr. | **2.** Í § 27, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:<br>"Hevur pensjónistur útsett pensjón sambært § 9 a, heldur rætturin til veitingar sambært hesi løgtingslóg tó uppat dagin eftir, at pensjónisturin doyr." |
| **§ 39.** Avgerðir hjá Almannaverkinum sambært hesi lóg kunnu kærast til Kærunevndina í Almannamálum. | **3.** Í § 39, stk. 1 verður "Kærunevndina í almannamálum" broytt til:<br>"Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum". |
| | **§ 2**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjalding av veitingum frá og við januar 2020. |